## DAGSINS MEINING

# Tsunami og aðrar vanlukkur

Tað er eitt ár síðani tann herviliga tsunami náttúruvanlukkan rakti londini kring Indiska havið. Í hesum sambandi verða minningarhald hildin í fleiri londum, eisini í Norðurlondum. Meira enn 200.000 fólk lótu lív í hesi tí mest oyðandi náttúruvanlukkuni í nýggjari tíð, teirra millum 700 norðbúgvar. Meira enn ein millión menniskju eru vorðin heimleys. Ringast rakt var Indonesia. Hini londini, sum vórðu rakt av tí risastóru havalduni, eru Thailand, Sri Lanka og India. Mong lond, teirra millum Føroyar, hava latið nógvan pening í hjálp til tsunamiraktu økini.

Enn ein hervilig náttúruvanlukka rakti Pakistan í hesum árinum. Her var talan um ein av ringastu jarðskjálvtunum í langar tíðir og er neyðin stór í fjallalendunum í Pakistan og Kashmir. Tað hevur víst seg at vera torførari at fáa eitt nú lond í Vesturheiminum at lata hjálp til tey raktu økini, helst tí at talan her er um eina vanlukku, sum "bara" hevur rakt lokalt. Fáir ella eingir europearar eru beinleiðis raktir av vanlukkini eins og støðan var við tsumanivanlukkuni, har túsundtals europearar doyðu. Møguliga skyldast hetta afturhaldni at lata hjálp til Pakistan ta sannroynd, at landið brúkar sera stóran part av sínum inntøkum til hernaðardubbing. Pakistan hevur sum kunnugt kjarnorkuvápn. Tá lond hava ráð til at hava kjarnorkuvápn hava tey eisini ráð til at taka sær av egnum ofrum frá náttúruvanlukkum munnu fleiri hugsa. Ein sannroynd er tað so, at tað hevur gingið striltið at fáa somu lond, sum hava veitt hjálp til tsunamioffrini, eisini at vísa offrunum í Pakistan ans.

Nú vit hyggja í bakspeglið og meta um bæði náttúruvanlukkur og menniskjaðgjørdar vanlukkur, so er greitt, at vit í komandi árum verða noydd til at hyggja meira eftir, hvussu vit sjálvi bera okkum at og í hvønn mun vit eru við til at skapa grundarlag fyri stórum vanlukkum. Her kemur okkum til hugs yvirupphitingin, sum eigur at fáa okkum at gera alt fyri at menna varandi orkukeldur heldur enn at økja um nýtsluna av kolvetni. Eitt annað øki, sum vit eisini mugu vísa størri ans, er støðugt vaksandi útbreiðslan av kjarnorku til hernaðarlig endamál. Vit hava sæð eina óhugnaliga tilgongd, har ódemokratisk lond hava fingið sær ella eru við at fáa sær kjarnorkuvápn, eitt nú Iran og Egyptaland.

Tað er kanska tann størsta ábyrgdin hjá altjóða samfelagnum at forða fyri, at fleiri lond fáa kjarnorkuvápn. Hesin vandin kann gerast enn álvarsligari enn náttúruvanlukkurnar. Tí eigur heimurin at standa saman og hava eina altjóða tilbúgving, sum fyrst og fremst skal hava til uppgávu at forða fyri útbreiðslu av kjarnorkuvápnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Løgin viðgerð

**Eitt eindømi í Føroya søgu, tá tað kemur til Kommunala Eftirlitið**

**Beate L. Samuelsen**
*býráðslimur*



Vit í minnilutanum í Tórshavnar Býráð halda tað vera sera løgið, at umboð fyri Kommunala Eftirlitið longu ein tíma undan býráðsfundinum hósdagin 15. des. 2005, í útvarpinum hevði eitt greitt svar til reiðar viðv. Degns húsum, um so var, at minnilutin ætlaði sær at kæra keypið av húsaognini.

Kæran um óhugnaliga kostnaðarmikla húsakeypið varð ikki send fyrr enn eina lítla viku seinni, 21. des. 05.

Hetta man vera fyrstu ferð í Føroya søgu, at ein kæra verður svarað, longu áðrenn málið er viðgjørt á býráðsfundi og áðrenn úrslit av viðgerðini fyriliggur.

Eitt so skjótt munnligt svar fra Kommunala Eftirlitinum hava vit sum býráðslimir ongantíð upplivað.

Vit í minnilutanum gita, at hetta var gjørt fyri at minnilutin skuldi typpast og sleppa ætlanini at kæra málið um Degns hús.

Her skal líka viðmerkjast, at sama svar frá Kommunala Eftirlitinum 15. desember var leitað fram aftur í tíðindaflutningi útvarpsins á miðdegi hósdagin 22. desember og serverað fyri lurtarunum einaferð aftrat.

Tey mál, vit í minnilutanum higartil í 2005 hava kært fyri Kommunala Eftirlitinum, hava vit ikki fingið svar uppá enn.

Kann vera, tað ikki er ein og hvør, sum fær svar, ið spyr ella kærir málsviðgerðir fyri Innlendismálaráðnum, sum Kommunala Eftirlitið hoyrir undir, men bert summi.

# Sjómenn og ALS-útgjald

**Arbeiðsloysisskipanin**

Eitt av evnunum í Degi og Viku hósdagin 22. desember 2005 var stovnsetan av einum nýggjum gerðarrætti í Føroyum. Upp í hetta evni var ALS og útgjald til fiskimenn tenkt saman. Umrøðan av hesum evni var eintáttað og mundi geva síggjarunum eina mynd, sum ikki er í samsvari við veruleikan.

Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum, Ellintur Abrahamsen, greiddi frá, at teirra felag saman við Fiskimannafelagnum m. a. hava sum treyt, at fasti gerðarrætturin ikki verður góðtikin, uttan at ALS-lógin verður broytt soleiðis, at fiskimenn fáa úr skipanini á jøvnum føti við aðrar.

Tað er ikki sørt ørkymlandi, at SVF ikki lat umboð fyri ALS koma til orðanna við eini viðmerking.

Tí tað vóru skeivleikar, sum krevja rættleiðingar.

**Øll við A-inntøku rinda ALS-gjald**

Øll, sum eru millum 16 og 67 ár, og sum hava A-inntøku og fulla skattskyldu í Føroyum, rinda ALS-gjald. Ávísar veitingar, pensjónir og avmarkað skattskyldug undir FAS eru tó untikin. Hetta er ásett í ALS-lógini, ið er løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997. Tað vil siga, at sjómenn, sum hava A inntøku, rinda ALS-gjald eins og øll onnur í Føroyum.

**Sjómenn fáa útgjald úr ALS á jøvnum føti við onnur**

Hagtøl fyri november mánað vísa, at tað eru 974 arbeiðsleys í Føroyum. Nevnast skal sum dømi at 180 persónar eru skrásettir í skipanini, sum hava arbeiðsroyndir og/ella arbeiðsynski sum dekkari.

Sambært ALS-lógini fáa sjómenn útgjald úr ALS á jøvnum føti við onnur, tá hesir gerast arbeiðsleysir, um vanligu treytirnar fyri útgjaldi eru loknar.

**Føroya Fiskimannafelag hevur ynski um eina serliga skipan fyri fiskimenn**

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag Óli Jacobsen hevur arbeitt við einum uppskoti um at gera eina serliga skipan fyri fiskimenn, soleiðis at hesir kunnu koma undir ALS, tá skip teirra liggur, hóast fiskimennirnir ikki eru uppsagdir. Meiriluti var ikki fyri hesum uppskoti í nevndini, ið gjørdi álit um broytingar í ALS-lógini, sum Landsstýrismaðurin í Vinnumálum setti í februar 2003. Álitið varð handað landsstýrismanninum í februar mánaði 2005. Hetta merkir tó ikki, at sjómenn ikki fáa útgjald úr ALS, tí tað fáa teir, um teir gerast arbeiðsleysir.

**Misvísandi tíðindaflutningur**

Tíðindini í Degi og Viku um, at ALS ikki rindar út til fiskimenn, eru misvísandi. Fiskimenn, sum verða raktir av arbeiðsloysi, fáa arbeiðsloysisstuðul, júst sum tað arbeiðandi fólkið á landi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.